# Handverkarin bukaði hinar

**25 ára gamli Jógvan Niclasen hevur seinastu vikuna verið við á sínum fyrstu Oyggjaleikum, og hann helmaði ikki í, fyrr enn hann hevði vunnið fýra gullmerki í bogaskjóting. Hann var suverenur í teimum nervapirrandi og avgerandi skotunum**

BOGASKJÓTING
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

### Jógvan Niclasen

Navnið hevur kanska ikki sagt øllum føroyingunum so nógv higartil.

Men navnið rungar millum bogaskjúttarnar á Oyggjaleikunum í Hetlandi, og tað ekkóar heilt til Føroya.

25 ára gamli havnamaðurin hevur tikið øll á bóli bogaskjótikappingunum. Tann róligi handverkarin gera einki hóvasták burtur úr sær sjálvum, men hann hevur verið heilt suverenur í teimum tøttu og avgerandi skotunum í Hetlandi.

### Ongar nervar

Tá ið onnur byrja at gera mistøk, hevur Jógvan Niclasen bara verið fullkomiliga tryggur – og púra ónervaður av trýsti og vónum.

– Um tú fyrst blívur nervøs, so er tað næstan liðugt. So kanst tú næstan pakka saman, tí tá byrjar tú at gera býttar feilir, sigur Jógvan Niclasen.

Men hetta trýstið tykist ikki nerva teg?

– Nei, tað hevur tað ikki gjørt, men eg veit ikki, um tað fer at koma seinni.




*– Um tú fyrst blívur nervøs, so er tað næstan liðugt. So kanst tú næstan pakka saman, tí tá byrjar tú at gera býttar feilir, sigur Jógvan Niclasen, sum var ísakaldur í teimum avgerandi kappingunum*

### Helt langan steðg

Jógvan Niclasen hevur skotið við boga í eini 13 ár samanlagt, men tá ið hann fór í læru sum handverkari legði hann boga og píl á hillina og helt ein fýra ára langan steðg frá bogaskjótingini.

Nú arbeiðir hann sum handverkari, men hann er eisini farin at skjóta aftur.

– Á seinastu Oyggjaleikunum hugdi eftir beiggja mín, tá ið hann skjeyt, og so keypti eg mær ein boga og byrjaði av nýggjum at skjóta, sigur hann.

Og eftir stuttari tíð hevur hann skotið seg fram millum allar hinar bogaskjúttarnar, og sum nýggjur maður í feltinum á Oyggjaleikunum var hann í serflokki og vann fýra gullmerki – tvey sum einstaklingur og tvey saman við liðnum í compound.

# Marius argaði olympiska meistaran

**Byrsuskjúttin Marius Joensen var við heilt har frammi, tá ið skeet-skjótingin varð avgjørd hósdagin. Hann lá seint í kappingini á odda og frammanfyri olympiska skjúttan av Álandi, men misti nøkur av teimum seinastu skotunum**

SKJÓTING
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Tingwall:** Marius Joensen tryggjaði hósdagin Føroyum eitt bronsumerki í skjóting.

Marius var við í skeetskjóting fyri einstaklingar, og hann kom í finaluna í kappingini.

Í finaluumfarinum kláraði Marius eina løtu at toga seg fram á fremsta plássið, og hann lá hesa løtuna frammanfyri olympiska meistaran av Álandi, Lennart Akerblom.

Men Marius misti nøkur av seinastu skotunum, og kappingin var so tøtt, at hann endaði á bronsuplássinum.

– Eg eri væl nøgdur við bronsuna. Kanska mangli eg eitt sindur av dystarvenjing til at kunna vinna ein slíka kapping, so hetta var fínt, segði hann eftir finaluna.

### Mangla kappingar

Marius Joensen venur nógv, men tað er avmarkað við avbjóðingum innan skjóting í Føroyum.

– Í Føroyum er bara eitt felag, og vit mangla kappingar. Tað sæst aftur her á Oyggjaleikunum, tí móti endanum misti eg leiðsluna. Eg hevði møguleikan at vinna gull, men hinir skjúttarnir hava nógv fleiri royndir frá altjóða kappingum til at verða við í so tættari kapping, segði Marius Joensen.

Hann endaði á 120 dúgvum, meðan teir báðir álendsku skjúttarnir, sum endaðu framman fyri, høvdu ávíkavist 122 og 123 dúgvur.

– Eg hevði als ikki roknað við, at eg skuldi fara at klára meg so væl á Oyggjaleikunum, so fari eg væl nøgdur heimaftur.

*Fyri fyrstu ferð í 12 ár vóru føroyskir byrsuskjúttar við í Oyggjaleikum, og Marius Joensen vann bronsu í skettskjótingini*

